# ÚTBJÓÐING
## Dagstovnar

Fyri Tórshavnar kommunu verður arbeiðið viðv. bygging av dagstovni við Landavegin og dagstovni við Sundsvegin boðið út alment og fevnir um hesar arbeiðstøkur.

Timburarbeiði
Snikkaraarbeiði
Múraraarbeiði
Hitaverk og sanitet
El-arbeiði
Málaraarbeiði
Gólvleggingararbeiði

Teir bjóðandi kunnu bjóða uppá báðar dagstovnarnar ella bjóða uppá ein dagstovn, tó skal kunna síggjast á tilboðunum, um bjóðað verður uppá báðar, hvat tilboðið er fyri hvønn stovnin.

Byggingin av dagstovninum við Sundsvegin er treytað av, at broytingin í byggisamtyktini fyri A1 øki í 3. grundumráði verður endaliga samtykt.

Útbjóðingartilfarið kann verða umbiðið nú og fæst móti kr. 5.000,00 í veð við krossaðum kekki, við at venda sær til teknistovuna hjá Albert Isfeld & Gundmund S. Hansen.

Boð skulu saman við útbjóðingartilfarinum latast inn á teknistovuna hjá ALBERT ISFELD & GUDMUND S. HANSEN, arkitektar A.F. sp/f, Lucas Debesargøta 11, Tórshavn, í afturlatnum brævbjálva merktur

»DAGSTOVNAR«

í seinasta lagi mánadagin **1. september 2003, kl. 16.00.**
Boðini verða tá latin upp og kunnu teir bjóðandi vera hjástaddir.

**Albert Isfeld & Gudmund S. Hansen arkitektar A.F. sp/f**
Lucas Debesargøta 11
Boks 70 - 110 Tórshavn
Tlf. 313696 · fax 316488

# GSM telefonir
Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic
# Tráðleysar
Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast
# Til skip og bátar
NMT 450 - VHF telefonir v.m.

Storno
SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

**veitst tú ikki tað?**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## SETHÚSASTYKKI Í HOYVÍKSHAGANUM SUÐUR

Kommunan heitir á tey, sum standa á bíðilistanum at fáa sethúsagrundstykki í "Hoyvíkshagi suður", og sum ynskja at keypa nú um skrivliga at boða Snarskivuni frá hesum sum skjótast og innan 18. august 2003.

Gjørt verður vart við, at umsøkjarar fremst á bíðilistanum hava fyrsta rætt til stykki, og at keypari skal lata kommununi váttan frá peningastovni, um at fígging fæst.

Meiri fæst at vita um útstykkingina og keypstreytir á heimasíðuni www.torshavn.fo, ella við at venda sær til Snarskivuna.

SNARSKIVAN

LANDSVERKFRØÐINGURIN

## Summarfrí

Sagt verður frá, at asfaltverkið og skervverkini eru stongd í summarfrítíðini frá og við 21. juli til og við 17. august.

**Landsverkfrøðingurin**




**tlf. 210875**

Vit byrja virksemi okkara á langtíðar parkeringsøkinum við flogvøllin mánadagin 14.07.2003.

Kostnaður fyri at hava bilin standandi, har vakthavandi hevur eftirlit við bili tygara, er kr. 30,- um samdøgurið. Upphæddin verður goldin við avgreiðsluna hjá vaktarhaldinum, tá bilurin verður heintaður.

## Summarfrí

Bilverkstaðið er stongt frá 21. juli til 20. august.

SUZUKI
Spf. Eyðbjørn Hansen
Varðagøtu 75, Tórshavn
Tlf. 313375

## Stongt vegna summarfrí

Vegna summarfrí verður skrivstovan stongd frá 22. juli til 15. august 2003.

**Sjúkrakassi Skála Læknadømis**
490 Strendur
Tlf. 449212, Fax 449232, t-post: sjkhil@post.olivant.fo

## Hús í Århus til sølu



Nýggj raðhús (frá dec. 2001) í Hasle í Århus til sølu.

Í húsunum, sum eru 97 fermetrar í einari hædd, eru durur, baðiverilsi, grovkøkur (bryggers), rúmlig stova og køkur í einum, trý kømur og gangur. Harafturat kemur ein amboðsskúrur á 6 fermetrar. Uttanum húsini er alt gjørt.

Húsini standa í sera friðarligum og barnavinarligum umhvørvi, tætt við skúlar og barnagarð/vøggustovu. Grønt umráði við skóg og smásjógvum eru tætt hjá.

**Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jóhan E. Simonsen á tlf. 520029.**

Student í Hoydølum '93?



Melda teg til jubilæums-veitsluna
NÚ!

Seinasta freist at tekna seg til veitsluna er sunnudagin 13. juli

| | |
|---|---|
| Hanus | (45) 22 64 23 44 |
| Marjun | (45) 22 34 36 98 |
| Janus | (45) 60 92 02 04 |
| Guri | (45) 22 89 56 89 |

Les meira:
http://reinert.starthotel.dk/veitsla

Sosialurin 341800



FØROYA LANDSSTÝRI
**FISKIMÁLARÁÐIÐ**
**FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ**

# 1. stýrimaður til Fiskiveiðieftirlitið

Eitt starv sum 1. stýrimaður við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verður hervið lýst leyst, til setan skjótast gjørligt.

**Starvið fevnir m. a. um hesar uppgávir:**
- Ganga vakt eftir vaktarskipan, sum skiparin fyriskipar.
- Luttaka í dagliga arbeiðinum.
- Útføra tær arbeiðsuppgávur sum eru sambært starvslýsing í SMS-manual-inum.
- Annað fyrifallandi arbeiði

**Førleikakrøv:**
- Skipsførara útbúgving.
- Ikki minni vinnubræv enn stýrimaður við handilsskipum á 3. stigi(STCW-regl. II/1 as Watchkeeping Officer).
- Heilsuváttan fyri sjómenn.
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum, norðurlenskum og enskum máli.
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa.

**Setanartreytir:**
Starvið er tænastumannastarv og lønt í 28. lønarflokki sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og deildir/stovnar undir tí, umfram hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið.

Starvsheiti er 1. stýrimaður.

Tann ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipa til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum, vinnibrævi og møguligum viðmælum, skulu verða Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 22. juli 2003 kl. 1200

Umsóknirnar skulu sendast til :

**Fiskiveiðieftirlitið, postsmoga 347, 110 Tórshavn.**

*Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 35 30 30 og tosa við Jóannes Heimustovu, samskipara.*

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Býarbókasavnið**
Á Býarbókasavninum eru tríggjar deildir:
- Útlán til vaksin
- Lesistova
- Barnabókasavn

Býarbókasavnið er fyri øll – børn og vaksin. Øllum stendur í boði at nýta savnið ókeypis, eisini fólki, sum ikki býr í Havn.

Býarbókasavnið eigur umleið 60.000 bøkur. Av teimum er okkurt um fjórðingurin barnabøkur.

www.byarbok.fo

## Hjálparfólk á Býarbókasavninum

Vegna farloyvi verður ¾ starv sum hjálparfólk frá 18. august 2003 til 31. desember 2003 leyst at søkja.

Arbeiðið er í avgreiðsluni í Niels Finsensgøtu.

**Førleikakrøv**
Teldukunnleiki eru neyðugur.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Onnu Brimnes, býarbókavørð, tlf. 31 36 26, ella Janus Isfeldt, leiðara á starvsfólkadeildini á tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 1. august 2003. Merk umsóknina "Býarbókasavnið".

# SJÓBJARGINGARSTØÐIN MRCC- Tórshavn

Tlf: +298-351300 * Fax: +298-351301 * Telex 81200 TLGR FA
Inmarsat C: 423 116210 * Inmarsat B: 323 116220 (voice) 323 116221 (Fax)

## Fráboðan um Seismikkvirksemi

Lýst verður, at seismiskar kanningar verða gjørdar á hesari havleið.

| | |
|---|---|
| Útnyrðingshornið | 61°30'N 005°20'W |
| Landnyrðingshornið | 61°30' N 004°30'W |
| Landsynningshornið | 61°00"N 004°30'W |
| Útsynningshornið | 61°00"N 005°20'W |

Felagið Veritas DGC Limited kannar økið.
Kanningarnar verða gjørdar vegna Statoil.°

| | |
|---|---|
| Byrjað verður | 17-07-2003 |
| Arbeiðið tekur væntandi | 3 vikur |
| Skipanavn | SRV Seisquest |
| Kallibókstavir/Flagg | LDIA/Norskt |
| Fiskiveiðiumboð | Janus Rein |

Samband fæst við SRV Seisquest á VHF rás 16.

Upplýsingar um dagligar seismiskar fráboðanir og ávaringar fáast á telefon 351300 ella telefaks 351301.

Eisini verður víst til heimasíðuna www.mrcc.fo

# Summarfrí

**21. juli - 8. august**

Vegna summarfrí er avgreiðslan stongd frá mánadagnum 21. juli til fríggjadagin 8. august, báðir dagar íroknaðir.

Telefonavgreiðslan er tó opin mánadag til fríggjadag kl. 10:00 – 12:00. Eisini er møguligt at seta seg í samband við ALS um telefax ella teldupost.

Útgjaldið av arbeiðsloysisstuðli fyri skeið 14 og 15 verður avgreitt sum vanligt.

ALS

## Hús í Tórshavn

Búgva tygum í einum húsum við einari hædd, sum hava stovu, køk, baðirúm við wc umframt kømur í hæddini? Tað kann saktans vera kjallari ella loft í húsunum.

Um tygum ynskja at búgva í einum størri húsum, hava vit eini hús í trimum hæddum við hjálli og bilhúsi. Kjallarahæddin er ikki innrættað.

Nærri fæst at vita á telefon 317081.

Lesið
Sosialurin
-tað loysir seg